## Barry skal ongan veg

Miðvallarspælarin Gareth Barry var á veg til Liverpool í summar, men feløgini samdust ikki um prísin, og nú sigur venjarin hjá Aston Villa, Martin O'Neill, at Barry sleppur ongan veg, tá flytingarvindeygað letur upp aftur í januar. - Vit hava ongantíð verið áhugaðir í at selja Barry fyri at vinna nógvar pengar, tí so høvdu vit selt hann í summar. Vit ætla, at hann skal halda fram í Aston Villa, sigur Martin O'Neill við Daily Star.



## Stóri misti í oddanum

Lyngby er við í toppinum í næstbestu donsku fótbóltsdeildini, men um vikuskiftið taptu teir toppdystin ímóti Viborg 3-2. Henrik Larsen, fyrrverandi landsliðsvenjari í Føroyum, er venjari hjá Lyngby, og mátti viðurkenna tap, tá Viborg skoraði til 3-2 í yvirtíðini av dystinum sunnudagin. Lyngby liggur nú nummar 3 í 1. deild við 27 stigum. Herfølge er fremst við 30 stigum, og Viborg nummar 2 við 28 stigum.

## Stigbendið kortini



**Tað er ikki í lagi, tá kjaftaslit og hálvgum harðskapur verða revsað á sama hátt á vøllinum**

KLUMMA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fyrsta eftirmetingin av júst lidna kappingarárinum í fótbólti var á skránni um vikuskiftið.

Ikki óvæntað var tað her sjálv kappingarskipanin, sum fekk mestu umrøðuna. Og tað var sum so eisini í fínasta lagi, nú veðrið eftir nøkur góð ár gav ilt av sær.

Eitt evni, sum tó ikki fekk umrøðu hesaferð, er skipanin við gulum kortum, sum eisini hevur verið nevnd onkra ferð í ár.

Tí tað er ikki í lagi, at eitt gult kort er eitt gult kort og annars punktum. Við verandi skipan verður eingin munur gjørdur á teimum brotum, sum føra til gulu kortini. Við øðrum orðum vil tað siga, at tey føri, har dómarin ivast í, um talan er um gult ella reytt, ella har ivamálið er, um brotið yvir høvur er til gult, verða revsað eins hart.

Og tað nýtist ikki nøkur serligt støddfrøðislig skipan til fyri at økja um rættvísi í hesum. Ein skipan, har gulu kortini verða graduerað – stigbend – í til dømis tríggjar flokkar, er sum so nóg mikið. Síðani kundu stig verið givin fyri hetta, eins og stig eiga at gevast fyri reyðu kortini, og so kunnu leikbannini raka, tá ávíst stigatal verður nátt.

Fleiri ferðir hevur verið frammi, at bissarnir sleppa ov væl á vøllinum. Ein slík skipan vil kanska ikki hava við sær, at hesir verða tiknir úr spælinum – og tað er heldur ikki meiningin. Men tað vildi havt við sær, at hesir verða revsaðir harðari enn teir, sum »bara« eru eitt sindur ólátaðir á vøllinum.

Sum er verður longu munur gjørdur á, hví spælarar fáa reytt kort, og hví skal tann munurin ikki eisini galda fyri tey gulu?

# Vann bronsu á Silverstone

**Terje Joensen úr Oyndarfirði var um vikuskiftið við til at vinna bronsu í sonevndari endurance-koyring á Silverstone**

MOTORÍTRÓTT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Ferðin er øgilig, tá koyrt verður í Supersport-flokkinum, men sjálvur vil Terje sleppa enn longur á leið innan motor-ítróttina*

Terje hevur hetta seinasta árið roynt at bitið seg fastan í enskum motorítrótti, og hóast tað enn er langur vegur til toppin, so hevur gongdin avgjørt verið á heilt góðari leið.

Eftir at hava koyrt eitt kappingarár hevi Terje gjørt av, at hann skuldi venda nøsina móti Føroyum í september, men tá hann varð biðin um at koma á endurance-lið í sonevnda Supersport-flokkinum, var hann ikki seinur at taka av.

### Fingu góða hjálp

Seinasta kappingin í hesum flokkinum var á víðgitnu Silverstone-breytini, og her gekk framúr væl.

- Hesaferð fingu vit serkøna hjálp fra einum, sum eitur Steve Jordan, ið eg eri komin at kenna hetta seinasta árið. Hann er sonevndur suspension-specialist, og er uppgáva hansara fyrst og fremst at optimera set-up'ið á súkkluni. Hartil var Mike Edwards – sum er eitt stórt navn innan motorítróttina – eisini partur av liðnum, og teir báðir vóru sera góðir stuðlar hjá okkum, sum koyrdu, sigur Terje Joensen.

Og góðu ráðini góvu eisini úrslit. Í innleiðandi koyringini gjørdust Terje og liðfelagarnir nummar 20, men eftir nógvar harðar tímar á súkkluni leygardagin, endaði alt við einum triðja plássi og har við eisini einum plássi á podiunum, har menn sum Schumacher, Hamilton og Senna eisini hava staðið.

### Langur vegur eftir

Persónliga er hetta besta úrslitið, sum Terje hevur nátt, men hóast væl nøgdur, so er hann skjótur at staðfesta, at tað enn er langur vegur eftir á mál.

- Hetta var sjálavndi serligt, men tað er framvegis langt upp til næstu bólkarnar, sum eru British National Supersport og British Superbikes, har kappast verður móti teimum bestu í Bretlandi.

- Og eg havi í øllum førum nóg mikið at hugsa um. Motorsúkklurnar eru sera hart tunaðar, og tí er slitið stórt, tá koyrt verður. Nú verður so farið undir at taka allan motorin sundur og skifta tað, sum skiftast skal. Ætlanirnar hjá liðnum fyri 2009 eru mest sum liðugt lagdar, og nú eri eg ígongd við at fáa nakrar stuðlar. Her niðri havi eg longu fingið nakrar, men nóg mikið er tað als ikki. Heima í Føroyum skal eg enn einaferð veita eina stóra tøkk til Andersens Beding, sum hevur verið ein trúgvur stuðul, og vónandi eydnast tað mær eisini at fáa onkrar stuðlar afturat, nú eg komið heim fyri veturin, sigur Terje Joensen.

## Svendborg á uppflytingarplássi

Tað gongur strúkandi hjá Svendborg í løtuni. Púra óvæntað liggja teir nú til uppflyting í næstbestu donsku deildina. Tað var greitt, tá Julian Johnsson og liðfelagarnir koppaðu eykaliðnum hjá AaB seinnapartin í gjár. Gestirnir vunnu 2-1, og sigursmálið fall, tá seks minuttir restaðu av dystinum. Julian Johnsson, sum var liðskipari, var á miðvøllinum allan dystin. Eisini Aarhus Fremad, við Krzyzstof Popczynski sum venjara, vann sín dyst í gjár. Teir vunnu við tveimum málum móti einum á útivølli móti Blokhus FC. Svendborg FC liggur í løtuni á øðrum plássi við 25 stigum, eitt minni enn oddaliðið, sum er eykaliðið hjá OB. Aarhus Fremad er á sjeynda plássinum við 20 stigum.

## Christian Høgni skoraði

AB misti eitt fet í oddastríðnum, tá Christian Høgni Jacobsen og liðfelagarnir bara fingu eitt stig á heimavølli móti Frem. Dysturin endaði 1-1. Á vitjandi liðnum vóru millum annað Atli Danielsen og Jón Rói Jacobsen, og teir kunnu frøðast um, at liðið nú ikki hevur tapt seks ferðir upp í slag. Christian Høgni Jacobsen sendi heimaliðið á sigurskós, tá eitt gott korter restaði av dystinum. Men í seinastu løtu javnaði Weibel til endaliga úrslitið. AB er í løtuni á fjórða plássinum við 23 stigum. Frem liggur sum nummar níggju við 16 stigum.